# Kvøðan frá løgmanni, nú Norðurlandahúsið verður 25 ár: Livandi prógv um vinalag

JÓANNES EIDESGAARD
løgmaður



Føroyingar eru norðurlendsk tjóð og norðurlendski samleikin millum føroyingar er sterkur. Hóast vit av formligum orsøkum enn ikki hava fullan limaskap í norðurlendska politiska samstarvinum, so taka vit fult og heilt lut í mentanarsamstarvinum. Alla staðir, har vit møta í norðurlendskum samstarvi, tað verði seg politiskt ella mentanarligt, kenna vit okkum vælkomin.

Í øllum norðurlenskum høpi møta vit stórum tokka og ektaðum og livandi áhuga fyri landi, mentan og list okkara. Føroyingar hava fingið norðurlendskar virðislønir fyri listarlig avrik innan fleiri listagreinir. Hetta merkir, at vit ikki bert taka ímóti men, at vit hava eins nógv at geva okkara norðurlendsku bróðratjóðum og alheiminum.

Tað vakra og byggilistarliga meistarverkið í Gundadali er tí ikki bert ein stórfingin bróðurlig gáva frá Norðurlandaráðnum og Norðurlendska Ráðharraráðnum til Føroya fólk og til hinar norðurlendsku tjóðirnar. Norðurlandahúsið er eisini eitt livandi prógv um vinalag millum brøðratjóðir og eitt prógv um tann stóra týdning, sum mentan og list hava fyri okkum menniskju. Tað er tí ikki av tilvild, at mentanarsamstarvið er ein hornasteinurin í samstarvinum millum norðurlendsku tjóðirnar.

Tað er torført við orðum at lýsa tann stóra týdning, ið Norðurlandahúsið hesi 25 árini hevur havt fyri okkum føroyingar. Húsið er vorðið savningarstaðið hjá okkum. Her hava fólk fingið listarligar upplivingar fyri lívið, her hava verið altjóða ráðstevnur og fundir, sum hava flutt mørk og sett Føroyar á heimskortið. Her hava verið tiltøk og samkomur, sum hava savnað fólk úr øllum landinum. Í húsinum hava verið ógloymandi løtur, har okkara egnu listafólk innan vakrar og tignarligar karmar hava fingið høvi at vísa landsmonnum, hvat tey duga og megna. Í húsinum hava Norðurlond givið okkum tað besta, ið tey kunnu bjóða. Húsið er tí ein fongur og ein stoltleiki fyri alt Føroya fólk.

Norðurlandahúsið er eisini við at gerast eitt aktiv og ein sterkur pallur hjá føroyingum í sambandi við tær avbjóðingar og teir møguleikar, sum altjóðagerðin gevur okkum. Í hesum høpi hevur víðkanin av húsinum serstakan týdning, og vit eru Norðurlanda Ráðharraráðnum sera takksom fyri tað álit og stórtøkni, sum her er víst okkum – sama vælvild og sami tokki sum fyri tjúgufimm árum síðan.

Vegna landsstýrið takki eg Norðurlandahúsinum fyri farnu tjúgufimm árini og ynski húsinum, stýrinum, starvsfólkum, brúkarum og øllum Norðurlondum hjartaliga til lukku við ynskinum um, at húsið eisini í framtíðini skal megna at virka til gleði og gangs fyri allar norðurlendsku tjóðirnar og annars øll, sum leita hendan vegin at kunna seg við okkum í Útnorðri.

# Skipaði viðurskifti – tað er alt, harra løgmaður

SONJA J. JÓGVANSDÓTTIR
samskipari í Samtak



**Góði løgmaður**

Tú tykist ikki sørt firtin í viðmerking tíni til lesarabræv mítt. Tað var als ikki ætlanin at stoyta teg, eg vildi bara minna teg á eitt lyfti tit góvu áðrenn valið, og beint eftir valið viðvíkjandi útlendskari arbeiðsmegi.

Okkum varð lovað, at tað skuldi gerast undir skipaðum viðurskiftum. Tað kann vera, at tit tóku feil, tá ið tit lovaðu hetta. Kanska vistu tit ikki, hvat tit lovaðu. Ella kann tað vera, at tit lovaðu hetta, so fakfeløgini tagdu upp undir valið.

Eg veit tað ikki – men lyftir vóru givin – sum ikki vísa seg at halda, tí varð ein viðmerking skrivað týsdagin, og tí haldi eg, at tú skalt fáa hetta svar.

**Skipaði viðurskifti**

Tað einasta fakfeløgini hava eftirlýst viðvíkjandi spurninginum um útlendska arbeiðsmegi eru skipaði viðurskifti. Tað eru tit – tann politiski myndugleikin - sum kunna gera hetta. Fakfeløg gera sínámillum sáttmálar við arbeiðsgevarar, vit hava ikki lóggávu myndugleika.

Vit halda heldur ikki, at tað er ov nógv at krevja, at einstakir bólkar ikki hava framíhjárættindi til arbeiði. T.v.s. at teir føroyingar og teir útlendingar, ið væntandi skulu arbeiða lið um lið, fáa somu rættindi.

**Fastlønarsáttmáli**

Tá ið víst verður á bræv frá formanninum í arbeiðsgevarafelagnum um, at tey binda seg til eina tilgongd viðvíkjandi fastlønarsáttmála – so vil eg bara viðmerkja, at handa tilsøgnin, er ikki annað enn eitt ætlanarskriv. Tilsøgnin er ikki bindandi á nakran hátt, og tað kann vísa seg at vera ein trupulleiki.

Framíhjárætturin er ikki uppstaðin av sáttmálum. Framíhjárætturin er uppstaðin av lóggávuarbeiðnum, sum politiski myndugleikin hevur framt.

Tað eru tit, sum í lóggávuarbeiðnum geva nøkrum fólkum - í hesum føri útlendskari arbeiðsmeg eini rættindi - og so restina av arbeiðsmegini – tvs føroyingum ongi rættindi. (Eg haldi tað er rætt, at fólk eru tryggjaði nøkur rættindi - so sum at kunna forsyrgja sær sjálvum – tað skulu bara ikki vera framíhjárættindi, sum ganga út yvir føroyska arbeiðsmegina.)

Tú hevur rætt í, at frægast hevði verið, at fingið ein ordiligan fastlønarsáttmála – spurningurin hevur leingi verið frammi, og er umrøddur undir sáttmálasamráðingum.

Fyri einum árið síðani (tá ið 3 ára sáttmáli var gjørdur) vóru so grundleggjandi ósemjur um, hvørjar meginreglur skulu liggja til grund fyri fastlønarsáttmálanum, at vónleyst var at fara víðari í spurninginum.

Um viðurskiftini eru broytt hetta seinasta árið veit eg ikki – sambært almennum úttalilsum hjá landsins stórsta arbeiðsgevara, so kemur tað ikki upp á tal at gera fastlønarsáttmála.

**Fiskavirkisskipanin**

Í fiskavinnuni í Danmark er tað A-kassin, sum borgar fyri, at flakafólk eru fastlønt.

Tá ið einki arbeiði er á fiskavirkjunum í dk, so verða arbeiðsfólkini send heim, og A-kassin rindar lønarískoyti, sum er 90% av vanligu lønini – t.v.s. vikulønin er tá um 3600 kr.

Hevur ein persónur forvunnið 1000 kr í tí vikuni, so rindar A-kassin 2600 kr, hevur ein persónur forvunnið 2000 kr, so rindar A-kassin 1600 kr, hevur persónurin forvunnið 0 kr, so rindar A-kassin 3600 kr. A-kassin kann nýtast í 30 vikur í eitt 2 ára skeið, og fólk eru at rokna sum tøk, tá ið tey fáa lønarískoyti úr A-kassanum.

Í Føroyum hava vit fiskavirkisskipanina hjá ALS, sum í mesta lagi gevur 2300 kr um vikuna. Nógv fáa munandi minnið, tí útrokningargrundarlagið, tá ið tey fáa fyrstu ferð úr skipanini er ikki nóg gott. Fólkini í fiskavirkisskipanini eru bundin at sínum arbeiðsgevara, og eru ikki tøk.

**Framíhjárættur**

Eg vóni harra løgmaður, at tú hevur eina back up ætlan, um samráðingarnar við arbeiðsgevararnar um fastlønarskipan ikki bera á mál, tí spurningin um framíhjárættin hava tit skapt.

Megna fakfeløgini ikki at fáa loysnirnar, so eru tað tit, ið mugu borðreiða við teimum, tí tað eru tit, sum skapa framíhjárættin - so einfalt er tað.

Eg hevði vónað, at eg kundi skrivað, at loysnin um útlendsku arbeiðsmegina lá í hondunum á arbeiðsgevarunum, men teir eru ikki bundnir á nakran hátt.

Tit hava ikki treytað tykkum tað í lógini, ið nú liggur í løgtinginum, at sáttmálar skulu gerast, sum tryggja bæði føroyingum og útlendingum, áðrenn latið verður meir upp. Tí kenna arbeiðsgevararnir ikki stórvegis trýst á sær, nú samráðast skal um fastlønarsáttmála í fiskavinnuni.

Tú tosar um longu tilgongdina í útlendingamálinum. Spell at tíðin hetta seinasta árið síðani grein 9a kom fram ikki var nýtt til at smíða fylgilógir og møguliga at hugsa øðrvísi á økinum. Við at gera tingini røtt frá byrjan kann sleppast undan fleiri av klassisku brotunum á lógir, sáttmálar og faklig rættindi.

Tað eru ikki fakfeløgini, ið skulu lastast fyri, at arbeiðsmarknaðurin ikki er latin upp. Tað einasta vit hava biðið um er, at tað verður undir skipaðum viðurskiftum.

**Endaviðmerkingar**

Annars hevur tú – harra løgmaður – hug at fýlast á mítt »gleps«, sum tú nevnir viðmerkingina – og tú biður um arbeiðsfrið. So leingi vit hava skrivi- og talufrælsi, so ætli eg at nýta høvi at tala og tala at! Hetta serliga, tá ið tað viðkemur viðurskiftunum hjá løntakarunum, sum eru limir í Samtak.

Sum ovasti politiski myndugleikin eigur tú at tola, at mál, ið tit arbeiða við, verða viðgjørd, og at tað verður kjakast um tey í almenna rúminum.

Tann dagin, tú ikki tolir, at spurnartekin verða sett við málini, og tann dagin, tú ikki tolir, at vit kjakast um spurningarnar – tann dagin er hóskandi at gevast í politikki, um tú virkar í einum samfelagið, sum byggir á fólkaræðiligar meginreglur.

Yvir til tygara – harra løgmaður

# Ein atkvøða fyri stjórnini

EDMUND JOENSEN
løgtings- og fólkatingsmaður



**Í Fólkatinginum í dag atkvøddi undirritaði saman við donsku stjórnini og feldi eitt andstøðuuppskot, ið gekk ímóti einum stjórnaruppskoti um at leggja dent á sjálvstøðugar próvtøkur á donskum universitetum. Talan er fyrst og fremst um eina atkvøðu fyri at tryggja borgarligu stjórnini stuðul í einum máli, sum andstøðan gjørdi til eina politiska styrkiroynd**

Samgonga og andstøða í Fólkatinginum brustu seinnapartin í dag saman í einari politiskari styrkiroynd, sum samgongan – og harvið stjórnin hjá Anders Fogh Rasmussen – vann. Undirritaði var við í hesi styrkiroynd og atkvøddi saman við stjórnini.

Málið, ið stríð stóð um, var eitt andstøðuuppskot, ið var sett sum mótuppskot móti einum stjórnaruppskotið. Í stuttum snýr uppskotið hjá stjórnini seg um, at donsk universitet frameftir skulu leggja størri dent á sjálvstøðugar próvtøkur heldur enn bólkapróvtøkur.

Framman undan atkvøðugreiðsluni í Tinginum hevði andstøðan uppsagt avtalurnar um "clearing" í hesum máli og greitt boðað frá, at ætlanin var at leggja stjórnina undir trýst og helst vinna meiriluta.

Undir slíkum umstøðum er støðan hjá undirritaða greið. Ein borgarlig stjórn við positivum og mennandi Føroyapolitikki, skal ikki koma í minniluta og harvið nervast, um mín atkvøða kann forða fyri tí.

Tí atkvøddi eg saman við stjórnini í hesum máli. Úrslitið av atkvøðugreiðsluni var, at 84 atkvøddu ímóti og 81 atkvøddu fyri. Harvið fall andstøðuuppskotið. Eftir hetta varð stjórnaruppskotið samtykt.

Hóast talan er um eitt sokallað innanríkispolitiskt mál í Danmark, er málið kortini ikki meira innanríkispolitiskt enn so, at hvør einasti føroyingur á donskum universitetum verður fevndur av tí.

Grundleggjandi havi eg ta hugsan, at vit í útbúgvingarskipanini eiga at leggja høvuðsdent á sjálvstøðug avrik og próvtøkur. Hinvegin eigur møguleiki framvegis at verða fyri felags projektum og góðum samstarvi millum tey lesandi. Stjórnaruppskotið tryggjar hesi bæði, og tí eri eg fegin um, at stjórnaruppskotið nú er samtykt.